Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Lønarhæddaravgjald

Spurningar:

1. Hvussu er býtið í inntøkum av lønarhæddaravgjaldi millum ávikavist heilsurøkt, tryggingarvirksemi og bankavirksemi?
2. Hvørjar tankar ger landsstýriskvinnan sær um, at lønarhæddaravgjald verður goldið av læknavirksemi, tannlækna- og øðrum dentalvirksemi, kiropraktikk, fysioterapi og aðrari veruligari heilsurøkt?
3. Hvørjar tankar ger landsstýriskvinnan sær um, at lønarhæddaravgjaldið fyri fíggjarvirksemi áður hevur verið hækkað, millum annað, tá útreiðslurnar av rentustuðli hjá landinum hava hækkað?

Viðmerkingar:
Lønarhæddaravgjald kom í gildi í Føroyum í 1994, sum eitt átak í samband við kreppuna, sum tá var í Føroyum.

Sambært lógini um lønarhæddaravgjald eru tríggir bólkar, sum rinda lønarhæddaravgjald av einum nærri ásettum avgjaldsgrundarlagi. Satsurin er 2,5% fyri læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktikk, fysioterapi og aðra veruliga heilsurøkt, meðan hann er 10% fyri tryggingarvirksemi og 12% fyri banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi og serligar elektroniskar tænastur, ið eru neyðugar fyri hetta virksemið.

Skipanin hevur verið endurmett í nøkrum umførum.

Millum annað hevur grundgevingin fyri at hækka hetta gjaldið fyri bankavirksemi verið, at útreiðslurnar til rentustuðul hjá landinum hava verið hækkandi.

Samstundis skilst, at fleiri smærri vinnufyritøkur, ið fáast við heilsurøkt, rinda eitt gjald, sum tey uppliva sum seinastu restirnar av kreppu-átøkunum, sum vórðu sett í verk fyrst í nítiárunum.

Sambært uppskotinum til fíggjarlóg verður væntað, at inntøkurnar av hesum gjaldi verða 41 mió. kr. í ár, so talan er um eina upphædd, sum ger mun í landskassanum, men tað hevði verið áhugavert at vitað eitt sindur nærri um gjøldini, og hvørjar tankar landsstýriskvinnan ger sær um hetta gjald.

Á Løgtingi, 16. november 2023

Eirikur í Jákupsstovu